


## Rúni arbeiðir við veiðitøkni

Stoltleikin hjá fyritøkuni JT electric á Kambsdali er trolkameraið, sum felagið seinastu 4-5 árini hevur ment til tað, sum tólið er í dag.

**Rúni Petersen er verkætlanarleiðari, og vit hava spurt hann, hvør hansara leiklutur er í hesum sambandi?**
- Eg havi ábyrgdina av, at menningin av trolkameranum heldur fram – og ikki stagnerar, og eg taki mær eisini av at marknaðarføra hesa vøru.

**Hvør var upprunaliga ætlanin við kameranum?**
- Upprunaliga var ætlanin, at kameraið skuldi brúkast til at justera veiðireiðskap, soleiðis at hann roynist optimalur, og mest møguligur fiskur kemur í trolið.

**Kann tólið eisini brúkast í øðrum sambandi?**
Ja, trolkameraið kann eisini brúkast í arbeiðnum at menna skipanir við skiljiristum. Tólið kann soleiðis brúkast í royndini at veiða tann største fiskin úr einum fiskastovni. Umframt at kunna brúkast í royndini at veiða optimalt, kann tólið sostatt eisini brúkast í strembanini eftir burðardyggari veiði.

**Á hvønn hátt kemur tólið skipum og reiðaríum til góðar?**
- Skipini hjá American Seafood Company, sum vit hava selt fleiri kamera til, hava stórar trupulleikar við hjáveiði av einum slagi av laksi, har kvotan er lítil og verður uppfaftur minni í 2011. Trupulleikin er, at tá hjáveiðikvotan hjá skipunum er uppi, noyðast tey at gevast at fiska.

**Kunnu myndirnar síggjast beinleiðis á brúnni?**
- Myndirnar kunnu síggjast, tá trolið er komið at borðið. Ein USB-kaðal verður settur í kameraið og í eina teldu, og tá sæst á livandi myndum, hvussu reiðskapurin arbeiddi undir tóvinum.

**Hvat kunnu myndirnar siga fiskimonnum?**
- Myndirnar vísa, hvussu reiðskapurin gongur, og her sæst eisini, hvussu skiljiristin virkar, og hvat møguliga kundi verið øðrvísi.

**Hvønn týdning hava myndirnar annars?**
- Tað veldst um, hvørjum tú miðjar eftir. Myndirnar, sum kameraið tekur, kunnu eisini brúkast mótvegis myndugleikum og umhvørvisfelagskapum sum prógv um, at arbeitt verður við loysnum – og hvussu effektiv skiljiristin er, sigur Rúni Petersen hjá JT electric.



# Jan Ulsø Madsen stjóri í BankNordik Danmark

**BankNordik hevur sett nýggjan stjóra fyri deildirnar í Danmark. Tað er Jan Ulsø Madsen, sum kemur frá einum starvi sum deildarleiðari hjá Danske Bank**

Leo Poulsen

Jan Ulsø Madsen skal standa á odda fyri nýggju vøksturfasuni, har málið er fleiri kundar, fleiri innlán og upp á sikt breiðari geografiskur dekningur.

BankNordik keypti í februar í fjør nýggju deildir hjá Sparbank í Jútlandi og Fjóni umframt trýggjar deildir í Grønlandi.

Jan Ulsø Madsen hevur verið økisstjóri og deildarleiðari í BG Bank og Bikuben, og forstjórin í BankNordik samtakinum, Janus Petersen, er sjálvandi stak væl nøgdur við nýggja stjóran í Danmark.

- Tað er ein royndur leiðari, vit seta handan róðrið í Danmark. Jan Ulsø Madsen hevur røttu royndirnar við handilsligari menning og strategi, samansjóðað við stórum innliti í krøvunum til lokalu deildirnar frá bæði privatkundum og vinnuni, sigur Janus Petersen.

## Í MORGIN

1/4 °C



5-10 m/s 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av norði, seinnapartin minni vindur av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

## MIKUDAGIN

2/5 °C



4-9 m/s 5-10 m/s

Gul til stívt aandøvsgul av eysatri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

## HÓSDAGIN

3/6 °C



8-13 m/s 6-11 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og seinnapartin avfall, mest sum regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og fríggjadagin yvirhøvur turt, men leygardagin regn. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga suðureftir.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga suðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 133 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -- | **Tromsø** | -2 | **Moskva** | -7 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 4 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 1 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 3 | **Oslo** | -1 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 14 |
| **Lerwick** | 1 | **Stokkhólm** | -5 | **Madrid** | 10 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 2 | **Keypmannah.** | 1 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 3 | **Helsinki** | -10 | **Malorca** | 12 | **New York** | 10 |

## VESTFALLSKYRRINDI

10. jan. Mánin longst frá jørðini
12. jan. Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. des. | 10:44 | 23:04 | 09:44 | 22:04 | 09:59 | 22:19 | 00:25 | 12:44 | 01:25 | 13:44 | 08:59 | 21:19 | 07:59 | 20:19 | 10:59 | 23:19 | 11:59 | - | 10:29 | 22:49 | 11:44 | - |
| 11. des. | 11:22 | 23:41 | 10:22 | 22:41 | 10:37 | 22:56 | 01:04 | 13:22 | 02:04 | 14:22 | 09:37 | 21:56 | 08:37 | 20:56 | 11:37 | 23:56 | 00:19 | 12:37 | 11:07 | 23:26 | 00:04 | 12:22 |
| 12. des. | - | 12:14 | 11:14 | 23:46 | 11:29 | - | 01:41 | 14:14 | 02:41 | 15:14 | 10:29 | 23:01 | 09:29 | 22:01 | - | 12:29 | 00:56 | 13:29 | 11:59 | - | 00:41 | 13:14 |
| 13. des. | 00:46 | 13:20 | - | 12:20 | 00:01 | 12:35 | 02:46 | 15:20 | 03:46 | 16:20 | 11:35 | - | 10:35 | 23:09 | 01:01 | 13:35 | 02:01 | 14:35 | 00:31 | 13:05 | 01:46 | 14:20 |
| 14. des. | 01:54 | 14:15 | 00:54 | 13:15 | 01:09 | 13:30 | 03:54 | 16:15 | 04:54 | 17:15 | 00:09 | 12:30 | 11:30 | 23:52 | 02:09 | 14:30 | 03:09 | 15:30 | 01:39 | 14:00 | 02:54 | 15:15 |